# Savnið útbúgvingarnar saman í

**- Vit hava nógvar góðar og spennandi útbúgvingar her í Klaksvík. Tann besta og rættasta loysnin er tí, at vit savna allar hesar útbúgvingar saman í ein stóran skúladepil, og sum kundi verðið eitt satt kraftsentur í økinum, sigur Gunvá við Keldu, býráðslimur í Klaksvík**



*- Við støði í Tekniska skúla kundi ein skapt ein sannan skúladepil her í Klaksvík, sigur Gunvá við Keldu*

SKÚLABÝUR
*Orð/myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** - Fyri mær er eingin ivi: Skulu vit fáa ung fólk at støðast og skapa størri trivna her í Klaksvík, mugu vit betra um umstøðurnar hjá teimum góðu og áhugaverdu útbúgvingunum í býnum, sigur Gunvá við Keldu, sum hevur skúlamál og mentamál sum tvey av sínum hjartamálum.

Hon er tí komin fram við eini ætlan um, at heimbýur hennara kann gerast ein rættur útbúgvingarbýur við øllum tí, sum skal hoyra til ein slíkan – tað er: skúlar, kollegium og umstøður at skapa eitt veruliga lestrarumhvørvi í næststørsta býi okkara.

Til at fremja hetta krevst fyrireiking, peningur, tænastur og mangt annað - og sjálvandi eisini lærarakreftir. Men hesum ber Gunvá við Keldu ikki ótta fyri:

- Tað verður tosað so nógv í dag um at fáa fólk við útbúgvingum heim aftur til Føroyar. Eg trúgvi, at ein slíkur skúladepil hevði avgjørt kunnað gjørt sítt til, at fólk vildu flutt heimaftur.

- Men eg veit, at fólk flyta ikki aftur til Føroyar ella Klaksvíkar bara eftir arbeiði. Tað skal annað og meiri til enn tað, men við eini miðvísari ætlan kundu vit her norðuri gjørt okkara til hetta, sigur býráðslimurin í Klaksvík.

Hinvegin er samferðslan í dag skipað soleiðis, at eingin trupulleiki er hjá komandi lærarum at búgva í Klaksvík, Havn, Eysturoynni ella fyri tað í Vágum.

- Ein slíkur skúladepil her í Klaksvík hevði uttan verið eitt trekkplástur fyri bæði næmingar og lærarar, sigur hon í hesi samrøðuni við Sosialin.

Vit settu henni stevnu ein dagin á Tekniska Skúla í Klaksvík. Her hittu vit bæði næmingar og skúlastjóran, sum kundu fegnast um at útbyggingin av skúlanum var at enda komin.

## Kraftsentur og skúladepil

Gunvá við Keldu varð vald í býráðið fyri fýra árum síðani. Inntil fyri kortum var hon millum annað forkvinna í mentanarnevndini.

Í tí dagliga samskiftinum millum býráðslimirnar í Klaksvík eru mál, ið snúgva seg um skúlar og undirvísing, ofta frammi.

Og sambært Gunvá við Keldu kemur meiri enn so fyri, at tosað verður um umstøðurnar og korini hjá útbúgvingunum sum longu eru í býnum í dag.

- Tað vísir seg, at tað er sera ymiskt, hvussu skúlarnir í býnum eru innrættaðir, hvussu teir verða stýrdir og hvussu skúlarnir eru fyri við hølum, greiðir hon frá.

Hesin veruleikin hevur fingið hana at gera sær sína hugsan, um tað ikki hevði gjørt útbúgvingarstigið í býnum meiri áhugavert um ein fekk savnað nakrar av hesum eindunum saman í eina.

Fleiri miðnámsskúlar finnast longu í hesum næststørsta býi okkara, og sambært Gunvá við Keldu kundi ein eisini fingið aðrar og fleiri útbúgvingar aftrat til Klaksvíkar – útbúgvingar sum ikki frammanundan finnast í landinum.

- Út frá hesum kundi ein so skapt eitt kraftsentur og ein skúla- og mentanardepil her í Klaksvík, sigur hon.

## Hotell- og matstovur

Hóast Klaksvík má metast sum fiskivinnuhøvuðsstaður okkara, so finnast eisini aðrar útbúgvingar her sum ikki beinleiðis knýta seg at høvuðsvinnu okkara.

Gunvá við Keldu vísir á, at Tekniski skúli er útbygdur og er ein stórur skúli í einum býi av slíkari støðd sum Klaksvík við sløkum 5000 íbúgvum

Umframt henda skúlan finst til dømis ein kokkaskúli og skiparaskúli sum húsast undir somu lon í einum góðum samstarvi, men sum helst hava brúk fyri øðrum og meiri hóskandi korum.

Eisini finnast aðrir og meiri kreativir skúlar sum til dømis Handarbeiðsskúlin, Vevskúlin og Húsarhaldsskúlin. Og so eigur ein heldur ikki at gloyma HF-skeiðið og virksemið í Trygdarmiðstøðini.

- Og møguleikar eru sjálvandi eisini fyri at ein fær útbúgvingar innan fyri bæði hotell- og matstovuøkið, sum ein annars má uttanlands at læra til, sigur Gunvá við Keldu, og leggur aftrat:

- Samstundis sum hetta er eitt øki, sum vit kundu gjørt nakað við, vita vit at henda bransjan hevur trupulleikar at fáa fólk í starv.

## Synergi

Við øllum hesum ymisku skúlunum í huga, er Gunvá við Keldu tí komin til ta niðurstøðu, at ein skúladepil í Klaksvík kundi bøtt uppá hetta.

- Ja, her kundi verið ein góður møguleiki at savna nakar av hesum kreativu skúlunum saman í ein einstakan depil. Tá vit nú hava